# Júst í Túni – søgan um



Helgi Jacobsen, tíðindamaður, hevur skrivað bókina Júst í Túni

**Mánadagin 4. desember var móttøka í Miðlahúsinum í sambandi við útgávu av bókini »Júst í Túni«, sum forlagið Ritsavn gevur út, og Helgi Jacobsen hevur skrivað**

BÓKAÚTGÁVA

*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kristian Vang og Jan Müller*

Nógv fólk vóru komin saman í Miðlahúsinum mánadagin, tá bókin »Júst í Túni« kom út, og Maja í Túni, einkjan eftir Júst, fekk fyrstu bókina handaða frá Helga Jacobsen, sum hevur skrivað bókina.

Bókin byrjar við hesum orðum: »Júst í Túni var ein verðinsmaður. Hann var ein stóðbrótari. Hann var óvanliga forvitin, og hann hevði nøkur lyndiseyðkenni, sum á ein natúrligan hátt løgdu eina slóð eftir manninn«.

Móttøkan var væl fyriskipað. Ein myndarøð við gomlum myndum varð sýnd á stórskýggja, meðan móttøkan var. Hetta vóru sera forvitnisligar myndir, sum ikki hava verið almennt frammi áður.

Helgi Jacobsen presenteraði bókina og Jóhan Vang, versonur Júst í Túni, segði frá hvussu tað var komið í lag, at bókin varð skrivað.

Eisini vóru nakrar áhuga-



Jóannes Hansen, versonur Júst í Túni, Meinhard Dalbúð og Tórbjørn Jacobsen



Símun í Túni, sonur Júst